KÍ-SKÁLA:

# Skálamenn eru favorittar í Klaksvík

**Nógv vendir skeivan vegin, tá ið klaksvíkingar fara at stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting móti skálamonnum, sum stríðast fyri framvegis at halda seg á FM kósini**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*



*Tað var ikki gamalt, men hesa ferð eru tað Skálamenn, sum eru favorittar, tá vitjað verður í Klaksvík*

Tað er nógv, sum sammett við ikki so gamla føroyska fótbóltssøgu vendir upp og niður, tá ið KÍ í morgin fer at fáa vitjan av Skála, sum fyrr í ár hevur vunnið 2-0 í Klaksvík. KÍ hevur vunnið FM seytjan ferðir, og Skála, sum er lutfalsliga nýtt í fremstu deildini, eigur framvegis fyrsta FM heitið á.

Men hesa ferð eru teir á Skála favorittar, tá ið teir fara til Klaksvíkar.

- Vit taka uppgávuna í størsta álvara. Fleiri elta okkum, og KÍ hevur sanniliga sítt at stríðast fyri, og tí verður tað torført. Tað verður neyðugt hjá okkum at arbeiða av fullum huga fyri søkini, staðfesta skálamenn, sum eru heilt væl fyri. Eingin er leikbannaður, og eingin er so mikið skaddur, at tað bilar.

Jónhard Frederiksberg og Pauli G. Hansen hava verið burturi frá venjing orsaka av landsliðsboðum, men teir komu báðir til hús aftur ómóðir, tí hvørgin teirra varð settur á vøllin mikukvøldið.

Hagtølini siga, at Skála ikki hevur tapt hesu megin summarsteðgin. Teir hava tapt tvær ferðir í ár. Fyrra ferðin var í 5. umfari, tá ið teir á heimavølli taptu 1-0 móti VB, og seinna ferðin var í 9. umfarinum, tá ið teir í Runavík taptu 1-0.

Í 22. umfarinum skal KÍ stríðast fyri at styrkja um sína støðu í botninum. Spurningurin er, um teir fara at gera tað við at leypa á, ella um teir fara at nýta sama mátan, sum fuglfirðingar nýttu á Skála fyri tveimum vikum síðani. Tá var tað um reppið, at ÍF fekk stig, og tað var rættuliga týðuligt, at tað líkaði skálamonnum ikki væl, at mótstøðuliðið lá aftarlaga og harvið syrgdi fyri at økið at spæla á gjørdist rættuliga avmarkað.

KÍ miðvallarin Høgni Madsen er leikbannaður eftir gula kortið í Gøtu, og Leon Bjartalíð verður ikki við. Hann varð í síðstu viku skaddur í fótinum undir venjing, og hann hevur ikki verið til venjingar í hesi vikuni.

Ove Nysted var leikbannaður í Gøtu. Hann er tøkur aftur. Tað er Kristoffur Jacobsen eisini. Hann hevur vitjað í sjálvum Bayern München og var tískil ikki við, tá ið KÍ vann 2-1 í Gøtu fyri tveimum vikum síðani. Eyðun Klakstein hevur vant tær seinastu vikurnar, og tað kann væl vera, at hann verður í hópinum í morgin.

Heðin á Lakjuni er einasti KÍ spælarin, sum síðstu vikuna hevur verið burturi frá venjing, tí hann hevur verið upptikin av landsliðskjansinum.

- Tað er framvegis langt á mál, áðrenn vit hava rokkið setninginum, sum er at sleppa burtur úr niðurflytingar hóttanini. Lagið undir venjingunum er gott. Áhugin er stórur, og vit hava vónir um, at tað við stuðli frá áskoðarunum skal eydnast at fáa úrtøku burturúr móti Skála, siga teir í Klaksvík.

KÍ hevur tapt fýra teir seinastu heimadystirnar, og fyrr í summar taptu teir 4-0 úti á Skála.

NSÍ-EB/Streymur:

# Báðir partar eru á kambinum

**NSÍ hevur ikki tapt seks tær seinastu ferðirnar, og í EB/-Streymi eru teir seinastu níggju ferðirnar farnir av vøllinum við stigum**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*



*Ikechukwu Onyema er nú aftur tøkur hjá NSÍ, eftir at hann hevur verið leikbannaður í tríggjar dystir*

Tað eru tvey av teimum, sum rættuliga leingi hava verið millum teirra við frægast úrtøku, sum í morgin bresta saman í Runavík. Fyri bæði NSÍ og EB/-Streym er tað galdandi, at talan helst skal gerast um fulla úrtøku, um dreymurin um heiðursmerkir og altjóða luttøku skal varðveitast.

Innanhýsis uppgerðirnar higartil í ár leggja ikki upp til fulla úrtøku. NSÍ hevur tvær ferðir verið á Eiði, og í báðum førunum eru teir farnir til hús aftur við 2-2.

Í EB/Streymi er sjálvsálitið í toppi, eftir at teir næstsíðsta leygardag sendu meistararnar í HB til hús aftur við 4-0 tapi. Hetta hevði við sær, at HB gav venjaranum sekkin.

Sorin Anghel hevur seinastu vikurnar verið heilt væl fyri. Hann skoraði trý mál móti HB. Tí er tað ikki so undarligt, at tað kom sum stórur kvøkkur, tá ið hann týskvøldið noyddist at gevast at venja orsaka av skaða. Fyrrapartin í gjár var ikki greitt, um hann verður tøkur í morgin, men teir vónaðu tað besta.

Knút Vesturtún var ikki við seinast orsaka av skaða. Hann er tøkur aftur. Arnbjørn Hansen og Jákup Martin Joensen eru ikki tøkir. Teir eru báðir skaddir.

Venjingarnar hjá EB/-Streymi hava ikki verið merktar av, at spælarar hava verið burturi frá í landsliðsørindum. Felagið eigur framvegis til góða, at ein av teirra spælarum fer at fáa landsliðsboð.

Vøllurin í Runavík er av sama slagi, sum vøllurin í Streymnesi er. Tí hava teir í EB/Streymi í síðstu viku og í hesi vikuni ikki vant á Mølini á Eiði, men heldur á graslíkinum í Streymnesi!

Í Runavík er tað ikki frítt, at teir framvegis iðra seg um, at tað ikki eydnaðist at fáa fult á Sevmýri, tá ið teir megnaðu at skjóta fýra mál. Úrslitið var 4-4, eftir at NSÍ eina løtu var frammanfyri 4-3 og hevði meiri enn ein møguleika at økja um leiðsluna.

- Hatta er farið. Vit mugu fegnast um, at tað eydnaðist so væl í álopspartinum og royna at tetta í hinum endanum, verður sagt úr Runavík.

Christian Høgni Jacobsen og Jens Martin Knudsen hava verið burturi frá í landsliðsørindum. Christian Høgni verður ikki við í morgin. Eftir gula kortið á Sevmýri er hann leikbannaður.

Ike hevur verið leikbannaður í trimum teimum seinastu dystunum. Í síðstu viku spældi hann í 3. deild, og hann verður við, tá ið EB/Streymur í morgin fer at vitja við Løkin.

Í NSÍ hava teir tær seinastu vikurnar kent seg at hava knívin á strúpanum. Tað siga teir seg eisini hava hesa ferð, men teir siga seg hava gott mót. Sami boðskapur ljóðar norðan úr Sundalagnum, og tá ið bæði liðini mest sum hava gloymt, hvussu tað kennist einki at fáa burturúr, so kann tað ikki annað enn gerast tætt og spennandi - rættuliga spennandi.

TB-B36:

# Málleyst higartil

**Tvær ferðir í ár hava TB og B36 spælt málleysan javnleik. Hesa ferð tykist hvørgin parturin at hava ráð til slíkan**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Í B36 iðra tey seg helst um, at liðið tvær ferðir hevur mist tvey stig í dystum móti botnliðnum av Tvøroyri. Stigamissir, sum tað ikki av álvara eru ráð til, um talan skal verða um eina tilveru heilt ovast á stigatalvuni.

Hinvegin munnu tey á Tvøroyri í øllum førum iðra seg um fyrra dystin, har einans stórspæl frá landsliðsmálverjanum hjá B36 forðaði TB at taka øll stigini.

Og hesaferð er lítið á ivast í, at hvørgin parturin er serliga áhugaður í einum javnleiki. TB skal skjótt til at savna sær nakrar sigrar, um tey ætla sær at flyta av botnsessinum, sum liðið nú hevur verið á í nøkur umfør, og við bara seks dystum eftir, er kjaftbandið um posan av álvara við at kennast stramt.

Og til uppgávuna hava teir í øllum førum alt fólkið tókt. Eisini Predrag Zivkovic, sum var leikbannaður, tá TB í sannari málveitslu spældi 4-4 móti NSÍ seinast.

Hjá B36 er miðvøllurin nakað skerdur, nú Mikkjal Thomassen er leikbannaður. Tað kann tó roknast við, at Fróði Benjaminsen verður fluttur úr miðverjuni og eitt stig niðan, og at Herbert í Lon, sum nú aftur er tøkur eftir skaða, tekur sess í miðverjuni.